J.nr.: 7380 K 004

# Sáttmáli

Hesin sáttmáli er millum Føroya Fornminnissavn og Sandavágs Kommunu.

Endamálið við sáttmálanum er at fáa fastar avtalur um mannagongd, í sambandi við viðlíkahaldi av eftirgjørdum fornminnum.

Føroya Fornminnissavn hevur, eftur lokna fornfrøðiliga rannsókn, valt at eftirgera leivdirnar av fornu búsetingini "Innanfyri Heygagerðið" í Sandavági. Hetta arbeiðið er gjørt úr flagi og vísur leivdirnar eftir trimum húsum.

Í samband við viðlíkahaldið av fornu búsetingini "Innanfyri Heygagerðið", er fylgjandi avtala gjørd partanna millum:

1. Føroya Fornminnissavn setur upp skelti, sum á føroyskum, donskum og enskum sigur frá, hvat fyri búseting talan er um og hvat er funnið. Her fyriliggur eisini tekning av toftunum.
2. Sandavágs Kommuna tekur ábyrgdina av, at toftirnar verða røktar, tvs, at grasið verður sligið á økinum rundanum sjálvar toftirnar og á teimum flaglagdu veggjunum. At gólvini verða hildin rein fyri ókrút og at steinsetingar verða hildnar sjónligar.
3. Skuldi ivamál tikið seg upp setir Sandavágs Kommuna seg í samband við Føroya Fornminnissavn, soleiðis at hesi kunnu verða greidd.
4. Føroya Fornminnissavn vitjar á staðnum minst annaðhvørt ár, fyri at meta um alt er í lagi.

Hoyvík hin 12. juni 2001

Kirstin Eliasen

Føroya Fornminnissavn
Kirstin Eliasen
landsantikvarur, vik.

Sandavágur, hin 20/6-2001.

R. Samuelsen

Sandavága Kommuna
Rósa Samuelsen
Borgarstjóri

KOMIÐ

21. JUN. 2001

Føroya Fornminnissavn